## KSF sigur nei

Eftir fund millum kommunurnar og landsstýrismenninar í fíggjarmálum og innlendismálum 25. juni, hevur Magni Laksáfoss boðað frá, at kassin hjá kommununum nú skal lokast til í ein ávísan mun. Men hetta heldur KSF lítið um, tí partvís hevur landið lagt nógvar nýggjar byrðar á kommunurnar, og partvís hava kommunurnar goldið niður nógva skuld seinastu árini, og hava tí nú fingið eitt lítið rásarúm at gera hartátroðkandi íløgur. Landsstýrið skjýtur upp eina útjavningarskipan fyri kommunurnar, men hetta er púra ófyrireikað, og tað eru kommunurnar sjálvar, sum skulu fíggjað hetta, verður sagt. Eisini er ætlanin at taka mest sum alt MVG-endurgjaldið frá kommununum. Men KSF sigur, at kommunurnar stýra væl og halda allar ásettar reglur. Niðurstøðan í einum tíðindaskrivi frá KSF er tí greið: Latið kommunurnar fáa frið.



# Leypa ikki á leistum fyri Magna Laksáfoss

**Magni Laksáfoss sleppur ikki at lata kommunurnar í spennitroyggju, fyrrenn hann sjálvur hevur víst, at hann meinar nakað við tað, hann førir fram, sigur Heðin Mortensen**

BÚSKAPAR-POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit fara ikki at leypa á leistum fyri Magna Laksáfoss.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og formaður í Kommunusamskipan Føroya góðtekur ikki uttan víðari, at kommunurnar nú skulu tálma útreiðslunum fyri at hjálpa upp á landsbúskapin.

Í Sosialinum í gjár greiddi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at hann hevur sett sær fyri at næsta ár, skulu hvørki landskassin ella kommunurnar hava fleiri útreiðslur, enn í ár fyri at tálma búskapinum.

Men tað er als ikki vist, at kommunurnar eru sinnaðar at spæla við.

Heðin Mortensen, sum er talsmaður hjá teimum stóru kommununum, staðfestir, at sjálvandi fara kommunurnar at viðgera ætlanina hjá landsstýrinum.

- Men vit taka ikki glaðbeint undir við, at Magni Laksáfoss smoyggjur kommunurnar í eina fíggjarliga spennitroyggju, staðfestir hann.

Annars hava kommunurnar lagt upp til at næsta ár skuldu kommunalu fíggjarætlanirnar hækka eini 5%.

Men Magni Laksáfoss vil altso hava eina null-loysn fyri at køla búskapin.

Heðin Mortensen vísir á, at landið hevur álagt kommununum nógvar uppgávur og tí er tað sjálvsagt, at tær mugu sleppa at økja útreiðslurnar.

- Kommunurnar hava stórar skyldur at byggja skúlar, barnagarðar og at byggja eldrarøktina út. Samstundis eru krøv sett til vatnveiting og kloakkir og annað. Tí ber ikki til at forða kommunum at byggja út.

- Tí sigur tað seg sjálvt, at vit kunnu ikki uttan víðari góðtaka, at landskassin áleggur kommununum at steðga við útbyggingum.

Borgarstjórin í Havn og formaðurin í Kommunusamskipan Føroya staðfestir, at áðrenn kommunurnar verða lætnar í spennitroyggju, eigur samgongan sjálv at ganga undan og vísa í verki, at hon er sinnað at tálma almennu útreiðslunum hjá landskassanum.

Tað heldur hann ikki, at landið ger.

- Landið økir sínar útreiðslur í stórum til rakstur og íløgur. Fleiri av hesum íløgum verða fjaldar á vanligu fíggjarlógini við at leggja tær í grunnar og almenn partafeløg. Men tær skulu so í øllum førum betalast.

### Ongin grund at stúra

Heðin Mortensen vísir á, at hinvegin hava kommunurnar ikki økt rakstrarútreiðslurnar nakað serligt. - Men kommunurnar hava bygt út. Talan er ikki luksusíløgur, men um íløgur, sum eru neyðugar fyri at ganga krøvum á møti, sum landsins myndugleikar sjálvir hava álagt kommununum. At rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum eru hækkaðar, er ein beinleiðis avleiðing av tí og tí má Magni Laksáfoss góðtaka tað.

Borgarstjórin í høvuðsstaðnum vísir á, at ræður tað um at tálma búskapinum, eigur Magni Laksáfoss ikki at ræðast kommunurnar.

- Kommunurnar eru besta trygdin fyri, at landsins búskapur ikki fer av kós. Vit kunnu ongantíð skylda meiri enn eina álíkning og tað er ein stór avmarking í sær sjálvum. Tá er nógv størri orsøk til at óttast peninganýtsluna hjá landskassanum, tí har verður ikki spart.

- Tí verður útspælið frá Magna Laksáfoss ikki svølgt rátt. Tó fara vit at viðgera spurningin væl og virðiliga.

Hinvegin ávarar formaðurin í Kommunusamskipan Føroya Magna Laksáfoss ímóti at trumfa nakað ígjøgnum.

- Trýst elvir til móttrýst, so tað fer at koma honum aftur um brekkur, sigur hann, uttan at nágreina tað nærri.

Sí eisini tíðindaskriv frá Kommunusamskipan Føroya aðrastaðni í blaðnum.



*- Vit spæla ikki við uttan so, at landsstýrið eisini spælir við, sigur Heðin Mortensen, formaður í felagnum fyri tær stóru føroysku kommununum*

# Laksáfoss avger ikki hvar skápið skal standa

**- Tað, sum Magni Laksáfoss sigur um undirsjóvartunnil í Sandoy, er typiskt fyri politikarar, ið ganga og hugna sær í miðstaðarøkinum, sigur Gerhard Lognberg**

SANDOYARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

- Hetta verður ikki nakað, sum Magni Laksáfoss bestemmar.

Gerhard Lognberg, tingmaður úr Sandoy, er fortørnaður um, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í Sosialinum í gjár mælir frá at gera undirsjóvartunnil í Sandoy.

Gerhard Lognberg er limur í samgonguni, akkurát, sum Magni Laksáfoss er tað, men sandoyartingmaðurin væntar kortini ikki nakra ósemju í samgonguni um Sandoyartunnilin.

Hann staðfestir, at samgongan hevur eina avtalu um at gera undirsjóvartunnil í Sandoy og hann krevur, at hendan avtalan verður hildin.

- Hetta er enntá ein avtala, sum er niðurfeld í samgonguskjalið

-Tað er ikki landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum ger av, um Sandoyartunnilin skal gerast, men Løgtingið einsamalt og har farið eg at krevja, at avtalan verður hildin.

- Eg vænti heldur ikki annað, enn at avtalan verður hildin og so kann Magni Laksáfoss siga akkurát, hvat hann vil, leggur Gerhard Lognberg afturat.

Hann sigur, at tað er at kalla fult forstáilsi í samgonguni fyri, at tunnilin verður gjørdur og í heyst er avtalað, at uppskot skal leggjast fyri Løgtingið um tunnilin.

Men er tað ikki rætt, at búskapurin er ov heitur og at tað er neyðugt at halda aftur við stórum útbyggingum til verri tíðir?

- Búskapurin er ikki hitnaður av tí, sum er gjørt í Sandoy. Hetta er so typiskt fyri politikarar, sum ganga og hugna sær í miðstaðarøkinum og sum ikki hava brúk fyri útjaðaranum.

Gerhard Lognberg staðfestir, at undirsjóvartunnilin er alt avgerðandi fyri Sandoy, tí ferðasambandið er ein bági.

- Tí kemur tað ikki uppá tal, at undirsjóvarttunnilin skal víkja fyri skúlabyggingum og gransking, sum uttan iva eisini verður í miðstaðarøkinum, sigur tingmaðurin.

Gerhard Lognberg sigur, at onki er bygt út í Sandoy, tí nú skuldi tað verða tunnilin, sum skuldi raðfestast fremst.

- Vit góðtóku eisini at sleppa ætlaða listaskúlanum í Sandoy afturfyri at fáa eina avtalu um undirsjóvartunnilin.

Tú hevur fyrr boðað frá, at tú ert so misnøgdur við samgonguna, at tú hevði umhugsað at taka teg úr samgonguni?

- Tað havi eg ofta gjørt, men tað fari eg ikki at blanda upp í hetta kjakið, tí vit hava eina greiða avtalu í samgonguni og eg ivist ikki í, at tann avtalan fer at halda.

Fleiri viðmerkingar vil hann ikki gera um tað.



*Magni Laksáfoss kann siga, akkurát, hvat hann vil. Tað er kortini ikki hann, sum ger av, um undirsjóvartunnil skal gerast í Sandoy. Tað avgerð Løgtingið einsamalt og har hava vit eina greiða avtalu, sigur Gerhard Lognberg*